## Verkætlanin við Stórutjørn fevnir nú um 590.000 fermetrar

fríggjadagur, 28. september 2007 13.23 - Innland



Høghúsini í verkætlanini, Stórutjørn, verða nú lækkað, og økið veksur upp í umleið 590.000 fermetrar. Búnaðarstovan hevur góðtikið at lata meiri landbúnaðarøkið til verkætlanina, og landbúnaðurin fær tí 60 milliónir krónur burturúr.

Upprunaliga skuldi Stóratjørn leggja seg á eitt 300.000 fermetra stórt øki í Hoyvíkshaganum, men hon er vaksin í stigum og er nú komin upp í 590.000 fermetrar. - Høghúsini til íbúðir eru lækkað og bygningar og verkløg skulu liggja nærri hvørjum øðrum, sigur stjórin í Stórutjørn, Bárður Nielsen.

- Búnaðarstovan hevur í prinsippinum givið loyvi til at lata meiri av haga og dyrkaðum lendi. Hetta er tó við teirri treyt, at tey formligu viðurskiftini við broyttari byggisamtykt verða góðkend, váttar Ari Johannesen, stjóri á Búnaðarstovuni.